# Ein vika við hugna og venjing



*Her er alt ferðalagið, sum var við á danmarkarferðini*

**Tað var ein vika við hugna og venjing, tá ið 46 limir í Heilafelagnum vóru eina viku á venjingar- og frítíðarmiðstøð í Danmark**

ÚTFERÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Umstøðurnar hjá føroyingum við heilaskaða hava leingi verið rættiliga vánaligar, ikki minst, hvat endurvenjingum viðvíkur.

Tað er ein orsøk til, at felagið av og á plagar at gera útferðir ymsastaðni, har tað ber til at kombinera venjingar-og hugna.

Aftur í summar hava tey verið uttanlands og hesuferð gekk ferðin til frítíðardeplinum, Slettestrand, í Norðurjútlandi.

Tilsamans vóru tey 46 fólk við níggju bilum, sum fóru til Danmarkar við Norrønu og tey vóru burtur í eina viku.

Tey siga, at á ferðini hevur Smyril Line veitt teimum so góða tænastu, sum man skal leita leingi eftir og sum tey eru ómetaliga takksom fyri.

- Tá ið vit skuldu umborð á Norrønu, sluppu vit umborð á Norrønu áðrenn hinir bilarnir fyri at gera tað meiri ómakaleyst at fáa fólk í rullustóli og illa gongd fólk upp á, sigur Bjarni Juul Petersen, sum var við á ferðini.

- Hetta var ein sera góð byrjan upp á ferðina, leggur hann afturat.

Tann góða ferðin helt fram, tí á ferðini niður var tað sum á gólvinum og serliga hugtakandi var tað at sigla innanskers í bakandi sól inn ímóti Bergen.

### Nógv á skránni

Í Hanstholm stóð bussur fyri teimum og har komu eisini tey upp í ferðalagið, sum ikki komu við Norrønu, men sum flugu niður.

Men tá ið tey komu til Slettenstrand, vísti tað seg, at ein lítil misskiljing var íkomin, tí kom undan kavi, at vit vóru komin fram ein dag fyrr enn vit skuldu.

- Men jydar eru fryntligt fólkaslag, so tað bleiv alt ornað í bestu semju við tað, at tey funnu aðra gisting til okkara. So samanumtikið gekk alt av tí besta og dagin eftir kom so alt upp á pláss.

- Dagin eftir sluppu vit ein túr í hestavogni runt í økinum og tað var eitt upplivilsi, tí landsslagið har um vegir er rættiliga sermerkt við so djúpum gjáum, sum tú ikki skuldi trúð vóru í Danmark, sigur Bjarni Juul Petersen.

Dagin eftir fóru tey á strondina at leita eftir steinum, sum tey slípaðu til mangt og hvat, tá ið tey komu heimaftur við sera góðari hjálp við frá einum fryntligum starvsfólki, sum altíð var til reiðar við góðum ráðum.

Summi fingið rættiliga nógv burtur úr teimum slípaðu steinunum.

Sjálvandi vóru tey eisini í handilsmiðstøðini, Bilka, og um kvøldið var hugnakvøld við nógvum sangi.

Mikukvøldið var so tað stóra veitslukvøldið við sera góðum mati og har orkestur spældi til dans og øll dansaðu, eisini tey, sum sótu í rullistóli.

Hósdagur var frídagur, sum hvør brúkti, sum tey hildu vera best og fríggjakvøldið var aftur hugnakvøld við sangi og har konufólkini, sum við vóru, settu sín serliga dám á við eini mótaframsýning, har tey vístu fram tey klæði, tey høvdu keypt.

Leygardagin varð so aftur pakkað og leiðin gekk til Hanstholm og umborð á Norrønu og aftur hesuferð fingu vit eina serstakliga góða tænastu frá Smyril Line.

Bjarni Juul Petersen sigur, at tað var kortini ikki bara hugni á ferðini, tí nógv brúkti eisini túrin til at venjingar av ymsum slagi, eitt nú fysioterapi og venjingar í heitum svimjihyli.

Aftur heimferðin við Norrønu var tað sum á gólvinum.

Bjarni Juul Petersen sigur, at eitt, sum gjørdi, at hendan ferðin bar til, var, at tey fingu ein hóp av málningum frá J.C Solarium, sum tey høvdu liggjandi.

- Hetta setti av álvara gongd á peningainnsavningina, tí málningarnir blivu allir seldir og í hesum føri vóru virki og kommunu rættiliga beinasom at keypa.

Annars fingu tey dyggan stuðul frá ymsum kommunum og allir stuðlarnir fáa eitt lítið takkarskriv frá Heilafelagnum við nøkrum myndum.

Bólkurin, sum skipaði fyri innsavningini var Jóhannus Rasmussen, Jógvan Sofus Vágsheyg, Estur Lognberg og Bjarni Juul Petersen.



*Tað var eitt serligt upplivilsi at sleppa ein túr við hestavogni*




*Her er dansur á hugnakvøldinu. Fremst á myndini eru Páll og Elin Vang*



*Aage, Sunrid, Jógvan Sofus og Anna umborð á Norrønu. Tey eru avbera væl nøgd við tænastuna frá Smyril Line*